## Ómannaður kavbátur

Ein ómannaður kavbátur, sum fór úr New Jersey í USA í apríl, er komin til Baiona Spania í øllum góðum. Ferðin tvørtur um Atlantshavið var góðar 7.400 kilometrar, og tað tók kavbátinum 221 samdøgur at sigla teinin. Kavbáturin, sum er nógv minni enn vanligir kavbátar, hevur ongan motor, men sigldi rak við streyminum tvørtur um Atlantshavið. Báturin hevði tó elektroniska útgerð, sum gjørdi, at hann fór við tí rætta streyminum. AP skrivar, at hetta er fyrstu ferð, at ein ómannaður kavbátur hevur siglt um Atlantshavið. Ein roynd varð gjørd í fjør, men hon miseydnaðist.



## Norðurkorea vil samstarva

Stýrið í Norðurkorea sigur nú, at tað er nú til reiðar at tingast við USA fyri at linna spenningin landanna millum. Tað skrivar almenna tíðindastovan KCNA. Politiskir eygleiðarar siga, at í veruleikanum merkir hetta, at Norðurkorea er sinnað at fara undir nýggjar samráðiingar við USA og grannalondini um at sleppa teirri umstríddu kjarnorkuverkætlanini. Tann fyrra samráðingarroyndin fór fyri bakka í februar. Ein týðandi amerikanskur diplomatur hevur júst verið í Norðurkorea og roynt at fáa landið aftur til samráðingarborðið.

# Trupult síðan militerurin yvirtók fiskiveiðieftirlitið

**Sonny Johannesen, skipari, sum í nógv ár hevur fiskað í russiskum sjógvi í Barentshavinum, sigur, at trupulleikarnir við russar hava tikið seg upp eftir, at militerurin tók yvir eftirlitið í russiska partinum av Barentshavinum fyri 3-4 árum síðan**

STRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit hava altíð havt sera góð viðurskifti við russiska fiskiveiðieftirlitið, og her havi eg fingið nógvar góðar vinir gjøgnum árini. Tað var altíð ein góður dagur, tá eftirlitið var umborð hjá okkum. Vit sótu og prátaðu og drukku kaffi saman og høvdu góðar og minniligar løtur.

Sonny Johannesen sigur, at trupulleikin í russiska partinum av Barentshavinum er íkomin, síðan militerurin yvirtók fiskiveiðieftirlitið.

- Militerurin ánar ikki, hvat tingini í veruleikanum snúgva seg um, og tí koma teir stundum eisini við spurningum, sum eru púrasta úr vón og viti – spurningum, sum einki eiga at hava við eitt slíkt eftirlit at gera.

Sonny Johannesen, sum í fleiri ár hevur ført flakatrolaran Enniberg, sigur, at teir á seinasta túri vóru aftur í Føroyum 27. november.

- Tá vit skuldu fara at sigla, høvdu vit samband við eftirlitið, og teir bóðu okkum bara sigla heim og ynsktu okkum góða ferð.

Eins og aðrir, sum hava verið partur av tí serstakliga góða samstarvi, sum hevur verið millum føroyingar og russar, harmast Sonny ómetaliga nógv um, at stýgur nú er komin í viðurskiftini millum londini.

### Vent í holuni

- Hetta er ógvuliga harmiligt. Vit hava heilt síðan 1977, tá vit sum fyrsta land gjørdu fiskiveiðiavtalu við russar, havt eitt so fyrimyndaliga gott samstarv. Vit hava nógv brúk fyri rættindunum í russiska partinum av Barentshavinum, og svartkjaftaskip úr eitt nú Murmansk hava nógv brúk fyri rættindunum og samstarvinum, tey hava í okkara sjógvi.

Skiparin sigur, at vent er í holuni eftir, at militerurin yvirtók eftirlitið í Barentshavinum.

- Nú er einki, sum tað var, og tað ringasta av øllum er, at militerurin slett ikki hevur skilt sína uppgávu sum fiskiveiðieftirlit, leggur hann aftrat.

Sonny Johannesen vísir á, at russar eisini hava bjóðað upp á Skálaberg, sum avtala er gjørd við japanesarar um.

- Men russar bjóðaðu ov lítið, og um hetta er mátin, teir vilja taka skipið, er hetta ein heilt margháttligur máti, leggur hann aftrat.

Sonna líkar ikki hetta mál og heldur, at tað er rættiliga lang úti, soleiðis sum Skálaberg og manningin umborð er viðfarin.

- Um allan heim er tað galdandi, at verður skip tikið, tí myndugleikarnir meta, at brot eru framd á fiskiveiðireglurnar, verður málið latið løgregluni, sum skjótast gjørligt kemur við sektaruppskoti.

Sonny Johannesen sigur, at orð finnast ikki fyri, hvussu militerurin hevur handfarið ítøkiliga málið um Skálaberg.

- Hetta er ein ógvuliga keðilig vend, og føroyskir myndugleikar eiga at gera alt, sum gerast kann, fyri, at viðurskiftini millum londini verða normaliserað aftur - skjótast gjørligt, sigur skiparin á Ennibergi.




*- Tað er vent í holuni eftir, at russiski militerurin yvirtók eftirlitið í Barentshavinum. Nú er einki, sum tað var, og tað ringasta av øllum er, at militerurin slett ikki hevur skilt sína uppgávu sum fiskiveiðieftirlit, sigur Sonny Johannesen, skipari á Enniberg*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Útgávukonsert í Leirvíkar Bátasavni

**Sunnudagin klokkan 16 fara Monika Stauss Joensen og Birgitte Schnakenburg at hava útgávukonsert í Leirvíkar Bátasavni. Hetta er í sambandi við fløgu við klassiskum perlum, sum júst er komin**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fólk kunnu ikki vænta sær minni enn nakrar klassiskar perlur í hugnaligum umhvørvi í Leirvíkar Bátasavni sunnudagin, tá Monika Stauss Joensen á violin og Birgitte Schnakenburg á klaveri fara at framføra.

Hetta er ein útgávukonsert, nú fløga, sum tær báðar hava spælt inn, júst er komin á marknaðin.

Tær báðar vísa á, at í klassiskum tónleiki eru mangar perlur, sum kunnu siga okkum nakað serstakt í ávísum løtum í lívinum.

- Yndi og dýpi í hesum tónleiki ger, at hann á serstakan hátt nemir við okkara kenslur. Burtur úr slíkum perlum úr fleiri londum og við ymiskari bakgrund, hava vit gjørt eitt perluband, sum vit vóna, at fólk kunnu fáa gleði av.

Tað siga tær báðar um fløguútgávuna.

Birgitte Schnakenburg er fødd og fekk útbúgving í Danmark, og í 2005 fekk hon starv í Føroya Musikskúla sum fylgispælari. Síðani hevur hon spæld ótaldar konsertir í Føroyum og í Danmark saman við næmingum og fulltíðar tónleikarum.

Monika Stauss Joensen er fødd í Sveits, er gift og búsitandi í Leirvík . Hon starvast partvís á Føroya Musikskúla og hevur lagt dent á kamartónleikin. Í seks ár hevur hon verið við til at skipa kamarkonsertir kring landið, har hon í fimm ár var forkvinna í Konsertfelagnum.

Seinastu tvey árini hava Monika og Birgitte regluliga spælt saman og hava havt fleiri konsertir.

Við Finni Hansen sum teknikara hava tey gjøgnum hetta árið spælt tónleikarperlur inn í Kringvarpinum, sum nú eru givnar út á fløgu.

Monika Stauss Joensen og Birgitte Schnakenburg siga, at øll eru hjartaliga vælkomin í hugnaliga umhvørvið í Leirvíkar Bátasavni sunnudagin klokkan 16, har kaffi verður at fáa og okkurt heimabakað úr køkinum hjá Moniku.

Tað er ókeypis at koma til konsertina, har eisini ber til at ogna sær fløguna fyri serprís sum er 100 krónur.



*Birgitte Schnakenburg og Monika Stauss Joensen selja nýggju fløguna fyri serprís eftir ókeypis konsertina í Leirvíkar Bátasavni seinnapartin sunnudagin*